Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Hjálparpakki til láglønt

Spurningar:

1. Hvør er orsøkin til, at løgmaður ikki metir tað vera skilagott at veita lágløntum hjálparpakka beinanvegin?
2. Kann løgmaður nágreina, nær ein hjálparpakki til láglønt og onnur við lágari inntøku kemur.

Viðmerkingar:
Inflatiónin í Føroyum er vaksin 4,4 prosent frá fyrsta ársfjórðingi í fjør til fyrsta ársfjórðing í ár, sæst á heimasíðuni hjá Landsbankanum.

Prísurin á brennievni er methøgur, og prísurin á matvørum er eisini vaksin nógv, og fer væntandi at halda fram at veksa eina løtu afturat.

Løgmaður var í tíðindasending í Kringvarpinum 23. mai 2022 og segði, at ongin hjálparpakki er á veg nú, men kanska seinni í ár. Á Facebook-síðuni hjá Sambandsflokkinum er løgmaður endurgivin fyri at siga soleiðis: "Ein hjálparpakki til tey, sum eru harðast rakt av inflatiónini, kemur væntandi til politiska viðgerð eftir ólavsøku"

Fyri at fáa nærri greiðu á hesum máli verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 25. mai 2022

Beinta Løwe Jacobsen